# Oyðimarkar dust eina stutta stund



*Sfinskurin og pyramidan hava í 4.500 ár sæð hvørt einasta sólarris og fylgt allari mentanarsøguni.*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tá tú stendur og hyggur at verkum sum teimum stóru pyramidunum og sfinksinum, gerst tú rættiliga varur við, hvussu stutt tað bilið er, tá lívið streymar gjøgnum teg sjálvan**



FERÐAFRÁSØGN

*Edvard Joensen úr Egyptalandi:*

Tað setir rættiliga hugan í gongd, tá ein fær møguleikan at standa framman fyri teimum stóru pyramidunum í Giza. Hesum risaverkum, sum einans er lisið um í søgubókunum, og sum ein so mangan hevur ynskt at sleppa at vitja. Ikki bara er tað søgan og undranin, sum fara í gjøgnum hugan. Men eisini kenslan av, hvussu lítil vit í veruleikanum eru. Og kortini hava teir, sum undan eru farnir, skapt verk, sum vit enn í dag, eini 4.500 ár seinni, ikki skilja.

Her tykist tíðin hava ivast, hvat hon skal gera. Skal hon halda fram, ella skal hon bara rættiliga steðga upp?

Her er tann ævigi sandurin undir fótinum, hóast asfalt er lagt á vegirnar framman fyri pyramidunum, og handlarnir standa at bresta við øllum handaslagi av minnislutum. Bíligar eftirgerðir, sum kanska illa halda túrin heim.

Men har er einki at gera við. Keypast skal, tí ikki ber til at koma aftur hiðani úr vøggu mentanar uttan eitthvørt minni. Um ikki annað so til at hava sum tinganest.

## Mena House

Ikki hava vertir okkara verið smátøknir, tá talan var um hotelvalið her niðri. Mena House er eitt tað allarkendasta hotellið í Miðeystri, og har angar av atmosferu og søgu. Hotellið varð bygt til upplatingina av Suezveitini í 1869, og hevur hýst nógvum kendum persónum síðan tá.

Mena House liggur bara nakrar fáar hundrað metrar frá teimum stóru pyramidunum í Giza. Og her varð millum annað operan Aida frumframførd júst í samband við Suezveitina.

Arabiskir og europeiskir kongar hava búð her. Amerikanskir forsetar, bretskir og kinesiskir forsætisráðharrar og ein rúgva av kendum sjónleikarum og øðrum góðum fólki.

Franklin Roosevelt og Winston Churchill búðu her ávegis til Jalta toppfundin við Stalin í 1943. Og her sat Winston Churchill í nr. 38 og gjørdi tær skitsurnar, sum einni býttu Europa í tveir partar.

Charlie Chaplin var einaferð skrivaður inn í nr. 33. Hann læt vindeygað upp, hugdi yvir á pyramiduna og mælti:

»Her er ov keðiligt«, og síðan flutti hann inn aftur til miðbýin í Kairo.

Alt, sum helt seg vera nakað í bretska heimsveldinum, helt til her. Og tað var av sonnum eitt snobbut selskap, vita tænararnir at siga. Og teir vita nógv, tí her hava somu familjur arbeitt ættarlið eftir ættarlið, og søgurnar eru nógvar.



*Mena House hevur sína egnu sál. Her hava nógv stórmenni búð ta hálvaaðru øldina, síðan hotellið varð bygt.*
*Mynd: Edvard Joensen*



Kom inn á gólvið, vit hava eitt fjøllbroytt úrval
Suðuroyingar
Vit eru at hitta í hølinum hjá Tordenskjold í Trongisvági fríggjadagin 2. feb. og leygardagin 3. feb.
Opið er:
Fríggjad. kl. 13.00-19.00
Leygard. kl. 10.00-14.00
÷20%, ÷30% og ÷50%
av ymsum vørum
SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979
(Oman fyri Lágargarð)
Sosialurin - 311820

Sum hinaferðina tá Edward Lawrence - Lawrence og Arabia - kom tvassandi skóleysur í beduinbúna inn í barrina og bað um eitt glas av geitamjólk. Tað dámdi ikki starvsfeløgum hansara, teimum ensku »colonial gentlemens«, sum høvdu sína heilt greiðu uppfatan um fólkaskikk.

Og eisini í dag koma teir, sum hava nakað »upp á seg« her á hotellið. Ófriðurin í Miðeystri er ógvusligur, og roynt verður alt møguligt fyri at slætta sjógvin.

Júst sum blaðmaðurin hjá Sosialinum kom framvið høvuðsinngongdini til Mena House, kom eitt bilafylgi, við motorsúkkluverju og blinkandi ljósum og steðgaði uttanfyri. Úr fleiri bilum lupu vápnaðir vaktarmenn, og úr bilinum, sum koyrdi beint fram til hurðina, steig amerikanski verjumálaráðharrin, William Cohen, sum var á samráðingarferð í Miðeystri.



*Lívverjarnir ansa væl eftir amerikanska verjumálaráðharranum, sum kemur úr bilinum.*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Cleopatra og Sfinksurin

Ein illa farin steinrisi stendur og lítur so grundandi móti eystri nakað niðan fyri stóru pyramidurnar. Fólk ganga, har sum alla aðrastaðni í grannalagnum, í stórum bólkum við einum ferðaleiðara, sum rættir armin í veðrið fyri at vísa, hvar hann er.

Okkara er ein ung kvinna, sum hevur verið við okkum allan dag. Hon er frá einumhvørjum ferðavinnufelagi í Kairo. Hon tosar alla tíðina. Gott enskt mál, og er løtt at skilja. Greitt er, at hon dugir søguna, sum hon er. Eisini í svøvni. Og ivaleyst gongur hon á sama hátt og fortelur ferðafóki hesar somu setningarnar dag út og dag inn. Tað virkar sum rutina. Ogvuliga avmáld og professionel. Lítil tíð til at svara spurningum.

Er tað soleiðis, Cleopatra drotning hevur sæð út. Kanska líkjast tær í sinni eisini. Cleopatra visti eisini, at hon vildi ráða. Ikki bara rómversku leiðararnir fingu hana at kenna. Hon dugdi at vera í parti við tí sigrandi, til tað kortini endaði galið, og hon varð fangað í skeiva partinum.

Men eisini Heródes kongur Mikli í Ísrael fekk hennara ráðaríka lyndi at kenna, tá hon vildi hava balsamlundirnar í Jeriko limaðar inn í egyptiska ríkið. Men Heródes var eingin hosa. So sum tann revurin hann var, fekk hann sett hana upp á pláss, og balsamlundirnar, sum gjørdu tað angandi smyrslið, vórðu verðandi hansara ogn.

Eg smoyggi mær líkasum burturúr fylginum eina løtu. Eg veit, hvar bussurin er og havi fingið at vita, nær vit skulu møta aftur.

Og so er at fara at síggja Sfinksin. Hendan gátuføra skapningin, sum hvørki er leyva ella maður, uttan bara partur av báðum.

Her hevur hann staðið í mong túsund ár. Hann er 73 metrar langur og umleið 20 metrar høgur. Høgdur úr klettinum, og av egyptologum mettur at vera frá Khefrens tíð. Khefren farao ráddi frá 2520 til 2494 fyri okkara tíðarrokning og lat eisini ta stóru pyramiduna byggja.

Tíðin hevur sett síni merki á Sfinksin. Veður og vindur, hermenn og ferðafólk. Øll hava máðað burturav. Nøsin er brotnað, og ymsar eru søgurnar, sum ganga um tað. Men trúligast er søgan, sum sigur, at hon er oyðiløgd av arabarum í miðøldini í eini roynd at tekkjast Allah.

Her hevur hann staðið og sæð Sólgudin hvønn morgum sent honum tær fyrstu strálurnar í andlitið, sum vent er móti honum. Hann hevur sæð søgu Egyptalands verða til og fer aftur í morgin at síggja ein strálandi loga í eystri. Hann hevur sæð teir stóru herleiðararnar sigra og leggja heimin undir seg. Teir steðgaðu á við hansara fót og boygdu høvur í virðing. Hann sá Alexander Mikla. Vakran sum ein barabar og hugsunarsaman sum ein profet. Hann sá Cæsar eitt kvøldið, hann óttaðist sólina. Hann sá Napoleon við sínum brennandi eygum. Øld eftir øld rann um enni hans. Og tó reistu hesir stóru hermenninir ikki annað enn eitt skýggj av oyðimarkarinnar dusti eitt stutt bil í mannaættarinnar søgu.

Eyðsýnt er virði hansara, og tað eru egyptisku myndugleikarnir eisini í ferð við at gera nakað við nú. Teir eru farnir at væla um Sfinksin. Tað verður laðað rundan um hann, soleiðis, at hann um nøkur ár fer at standa fínur og at síggja til órørdur, hóast tann, sum hugsar, veit, at hann í veruleikanum er rættiliga illa farin.

Men soleiðis er. Tíðin er tíðin, á øllum hon vann. Men maðurin vil so fegin vera harri yvir tíðini eisini. Og tá einki annað gerst, fer hann undir at seta tíðina upp á pláss.

Men hvat er ein maður einsamaldur í endaleysa rúminum? spyr Símun av Skarði, og svarar í sama ørindi:

»Eitt fon, ið hvørvur burt sum hjóm!«

Men enn stendur Sfinksurin og lýtir at hvørjum einasta sólarrisi, sum hann hevur gjørt í meira enn 4.000 ár.

∆



*Sá Cleopatra kanska soleiðis út? Vøkur, avmáld og køld?*
*Mynd: Edvard Joensen*